# Teistin siglir hósdagin

**Nýggja sandoyarskipið hjá Strandfaraskipum Landsins, Teistin, verður nú sett í sigling millum Skopun og Gomlurætt. Ætlanin er at royna Teistan í dag og seta hann í fasta rutusigling í morgin, hósdagin.**

SAMFERÐSLA
*Rúnar Reistrup*

Skrúvan á nýggja Teistanum hevur ikki malið í skjótt tríggjar mánaðir, men í dag fer Teistin eftir ætlandi siglandi av Skála, har hann hevur ligið spildurnýggjur, men óvirkin, í skjótt tríggjar mánaðir.

Fyrst var tað ósemjan millum Fíggjarmálastýrið og Skipara- & Navigatørfelagið, sum forðaði nýggja skipinum at fara í sigling, og síðan tann trætan varð loyst, hava Strandfaraskip Landsins bíðað eftir einum lítlum elektroniskum eykaluti, sum Teistanum vantaði, og sum forðaði honum í at fara í sigling.

Eykaluturin, sum skuldi fáast til vega úr Týsklandi, kom við flogfari til Føroya fyrrapartin í gjár, og væntandi fór Teistin at gerast siglingarførur seinni á degnum.

## Skal roynast umaftur

Magnus Magnussen, tekniskur leiðari á Strandfaraskipum Landsins, sigur, at nú Teistin hevur ligið í tríggjar mánaðir, skal nógv av útgerðini, ið varð roynd fyri trimum mánaðum síðan, roynast aftur, áðrenn skipið kann setast í sigling.

– Tríggir mánaðir eru lang tíð hjá einum skipi at liggja, og hóast Teistin hevur ligið væl, so mugu vit ganga ígjøgnum útgerðina einaferð afturat, sigur Magnus Magnussen.

Manningin á strandfaraskipinum Trónda arbeiðir í tveimum vaktum, og tað verður onnur av hesum vaktum, sum fer at royna nýggja Teistan í dag, meðan hin vaktin fer at røkja rutusiglingina við Trónda.

Sum kunnugt var tað ætlanin at Teistin skuldi takast í nýtslu fyri langari tíð síðan, og tað hevði eisini passað Strandferðsluni nógv betur. Nú verður Teistin tikin í nýtslu í hægstu feriutíð, men tað hevur skund at fáa nýggja skipið í sigling, so Strandfaraskip Landsins fara ikki at bíða eftir, at starvsfólkið kemur aftur úr feriu.



*Um alt gongur sum ætlað, liggur Teistin klárur at taka ímóti ferðafólki í Skopun hósmorgunin.*

## Úr Kalli til Klaksvíkar



**Av tí at tað gjørdist ov møtumikið at ferðast millum Klaksvíkina og Havnina, hevur Rani Nolsøe valt at siga starv sítt upp sum menningarstjóri á Kalli.**

STARVSSKIFTI
*Rúnar Reistrup*

Rani Nolsøe hevur sagt seg úr starvi sum menningarstjóri á fjarskiftisfyritøkuni Kall. At hann hevur valt at fara úr starvinum kemst sambært Rana Nolsøe ikki av nakrari ósemju, men hinvegin av at ferðasambandið millum Klaksvíkina og meginøkið gjørdi tað ómøguligt hjá honum at røkja sítt starv í Havn og samstundis vera virkin í Klaksvík.

Rani Nolsøe er býráðslimur í Klaksvík, og millum annað av hesi orsøk vildi hann ikki flyta bústað til Havnar.

Rani Nolsøe hevur havt farloyvi frá starvinum sum havnar- og menningarstjóri í Klaksvík og fer nú aftur í hetta starv.

# Trolarar á seiðabergi vestanfyri



*"Columbus"*



*"Nornagestur"*



*"Rock Amador"*

ÓLÓGLIG VEIÐA
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

"Brimi" gjørdi eitt rættuligt hál í mánadagin, tá hann kannaði veiðuna hjá trolarum, sum royndu vestur úr Mikinesi. Trolararnir høvdu alt ov nógv av ungfiski í hálunum upp í yvir 70 prosent, og mest loyvda veiðan av ungfiski er 30 prosent.

Lógin um vinnuligan fiskiskap ásetir, at skip skulu boða frá beinanvegin tey eru varug við, at ov nógvur ungfiskur er í veiðuni. Men "Rock Amador", "Columbus" og "Nornagestur" høvdu ikki fylgt hesi áseting, tá menn av "Brimli" komu umborð at kanna veiðuna.

Hesir tríggir trolararnir fáa nú veiðubann í tvær vikur sum revsing

Vakthavandi á Vaktartænastuni sigur, at í einstøkum hálum var yvir 70 prosent ungfiskur. Leiðin vestanfyri er nú stongd eina viku og Vaktartænastan vónar, at ungfiskurin tá hevur spjatt seg. Tað er vanligt hesa tíðina, at ungfiskur er upp í veiðuni. Eitt par av kubatrolarunum bóru eisini við ungfisk á Suðuroyarbankanum um somu tíð. Teir boðaðu frá, og hendan leið er eisini stongd nú.

## Stórur ungfiskur

Føroysku myndugleikarnir seta stór krøv til fiskimannin, og ungfiskur undir Føroyum er tað sum stórur fiskur í Norðsjónum. Reglurnar siga, at upsi undir 55 sentimetur verður roknaður sum ungfiskur, toskur unfir 50 sentimetur og hýsa undir 45 sentimetur.

Norðmenn royna eftir seiði, sum er minni enn 50 sentimetur við nót.



# Damu- og harratroyggja

v/mynstri



| Størrelser: | xliten | liten | middels | stor | xstor |
|---|---|---|---|---|---|
| **Overvidde:** (plaggets mål)Ca. | 106 | 112 | 118 | 125 | 131 cm |
| **Hel lengde:** Ca. | 64 | 66 | 68 | 70 | 72 cm |
| **Ermelengde:** Ca. | 47 | 48 | 49 | 50 | 51 cm |

**MATERIALER:** **Gjestal Vestlandsgarn (100% ull), eller Superwash Sport (100% superwash ull), nøster à 50 g.** **Kan også strikkes i Gjestal Bomull Sport (100% bomull).**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| beige nr. 253 eller rustrødt nr. 263 ca. | 19 | 20 | 21 | 22 | 23 nøster |

**Pinner:** Rundp og strømpep nr. 2½ og 3½ eller 4. Liten rundp nr. 3 til halsen. 1 flettep (hjelpep).

**Vanlige forkortelser**
M=maske. r=rett. vr=vrang, str=strikk, p=pinne, omg=omgang, vr-bord=vrangbord, glattstr=glattstrikk, rettstr=rettstrikk, vrangbordstr=vrangbordstrikk, kantm=kantmaske. arb=arbeidet, beg=begynn, forts=fortsett, sm=sammen, g=gram.

**Strikkefasthet:** 23 m glattstrikk og 26 m flettemønster i bredden på p nr. 3½ eller 4 måler 10 cm. **Husk at strikkefastheten må holdes hvis resultatet skal bli vellykket.**

**Bolen**
Legg opp 258-274-292-308-324 m på rundp nr. 2½ og str 6-6-6-6-6 cm rundt i vrangbordstr med 1 vridd r, 1 vr. Skift til rundp nr. 3½ eller 4 og str 1 omg glattstr hvor det økes jevnt fordelt ut til 276-292-308-324-340 m. Sett et merke i hver side. Beg i siden for din størrelse og str frem til merket i den andre siden og beg forfra igjen for din størrelse og str mønsteret en gang til. Str mønster etter diagrammet hele veien opp. **Men samtidig** når arb måler ca. 57-59-61-63-65 cm felles de midterste 24-26-28-30-32 m på forstykket av til halsringning og det str videre frem og tilbake. Fell videre på hver 2. p mot halsen med 3,2,1 m i hver side (likt for alle størrelser). Str til arb måler ca. 64-66-68-70-72 cm og fell de resterende m av til en pen, jevn kant som ikke strammer.

**Ermene**
Legg opp 48-50-52-54-56 m på strømp nr. 2½ og str vrangbordstr som på bolen. Skift til strømpep nr. 3½ eller 4 og str 1 omg glattstr hvor det økes jevnt fordelt til 79-81-83-87-91 m. Str mønster etter diagrammet og med dobbel perlestr på hver side (tell ut fra midten på ermet slik at mønsteret blir likt til hver side fra midten. **Samtidig:** Sett et merke over 2 m på undersiden av ermet og øk 1 m på hver side av de 2 midtm på hver 5. omg hele veien opp. Str de nye m med i dobbel perlestr etter hvert. Str til arb måler ca. 47-48-49-50-51 cm. Snu arb og str 5 omg glattstr til belegg. Fell løst av. Str det andre ermet likt.

**Montering og hals**
Merk av til ermehull i hver side tilsvarende vidden øverst på ermene. Sy 2 maskinsømmer rundt hvert ermehull på hver side av midtm i sidene og klipp opp mellom sømmene. Sy eller mask sm på skuldrene.

**Hals:** Plukk eller str opp ca. 108-110-112-114-116 m rundt halsringningen på liten rundp nr. 3 og str 1 omg r hvor det økes jevnt fordelt til 128-130-132-134-136 m. Snu arb og str rundt i vrangbordstr fra vrangen med 1 vridd r, 1 vr til halskanten måler ca. 10-12-14-15-16 cm. Fell av i vrangbordstr til en pen, jevn kant som ikke strammer.

Sy i ermene og sy til belegget flatt over sårkanten på vrangen. Fest alle løse tråder pent på vrangen.

*Press ikke arb, men legg eventuelt plagget flatt i fasong under fuktige håndklær og la det ligge til det er tørt.*



**Uppskriftin hesa vikuna**

Tógvheilsølan
TRÁÐUR SP/F
Tlf. 312727
Sverrisgøta 19 · Postboks 181 · FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 31 27 27 · Fax +298 31 96 23 · Mobile +298 21 77 27
Privat: Tel +298 31 66 46